# nakað annað..

**- Eitt øðrvísi evni:**

*Branding av Føroyum. Næmingarnir í hesum bólkinum hugleiddu um, hvussu vit í Føroyum eiga at branda okkum mótvegis umheiminum. Hugskotini til búmerki vóru mong, men her er so eitt teirra: "Náttúra, lívsgleði, orka, kærleiki, menning, friðsæla, tryggleiki og óvæntað veðurlag.*

*Grønu strikurnar longst til vinstru mynda stóru náttúruna - fjøll og berg - í Føroyum. Gráa strikan innií lýsir myndina av einum fiski, so okkara størsta vinna eisini fær sín part í búmerkinum. Grøni liturin gevur eina kenslu av friði og tryggleika. Síðani síggja vit sólina og vatndropan - óvæntaða og fjølbroytta veðurlagið - ið saman mynda ein glaðan persón - tann lívsglaða føroyingin. Rundan um síggja vit reyða hjartað, ið myndar kærleikan og góðsemið, sum eyðkennir føroyingar. Tað at heildin hellir frameftir - skák til høgru - myndar føroyska samfelagið í menning - á ferð frameftir*

Discover the Faroes



*Ein bólkur av vísindafólkum og granskarum í hvítum kitlum genspleysaðu fluorescerandi bakteriur úr hvalspýggju*



*So er borðreitt!! Ætlanin er at bjóða fólki smakkiroyndir av boullabaisse (franskari fiskasúpan) og aðrar franskar freistingar til framløguna í kvøld*



*Ein stórur bólkur arbeiddi við fiski. Tey vóru floti og vitjaðu fiskamarknaðin. Síðani hagreiddu tey fiskin og kókaðu fiskasuppu – eitt nú úr sermerkta fiskaslagnum, lítil brosma, sum er vanligur matur sunnanfyri*



*Krútroykurin talaði fyri seg her verkfrøðingarnir halda til. Bólkurin arbeiddi við konstruktiónum av ymsum slag*




*Rúsdrekka á borðinum. Hesi bakaðu pannukøkur við vodka! Ein turrlagdur alkoholikari var á vitjan, og síðani vitjaðu tey í einum klubba, har tey blandaðu drykkir og tóku ein film upp*



*Angaroykurin av mati hongur um allan skúlan, tí fleiri bólkar valdu at gera mat. Franskan mat, fiskamat og tertur úr øllum heiminum – bæði mat- og køkutertur*